# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Hetta kann ikki halda fram. Vit mugu gera av við yvirgangsmenninar eina ferð med alla*

*(Pervez Musharaf, forseti)*



*Stjórnin hevur sent herin at steðga ófriðinum, og í morgun brúkti herurin fyri fyrstu ferð táragass ímóti fólki, sum sýta fyri at góðkenna valúrslitið*

# Hópneyðtøkur gerandiskostur í Kenya

**Nógvar kvinnur eru neyðtiknar fyri eygunum á teirra næstu**

Ófriðurin aftan á forseta- og tjóðartingsvalið í Kenya hevur gjørt, at summastaðni í landinum er tað vandamikið at vera kvinna.

Í høvuðsstaðnum Nairobi er talið á neyðtøkum vaksið sera nógv, síðani ófriðurin kyknaði. Sam Thenya, sum er leiðari á einum kvinnusjúkrahúsi í Nairobi, sigur við Reuters, at talan er ikki um vanligar neyðtøkur longur, tí í flestu førum eru kvinnurnar neyðtiknar fleiri ferðir. Bara tað seinasta samdøgrið eru 19 neyðtiknar kvinnur komnar á sjúkrahúsið.

- Fleiri av kvinnunum hava greitt frá, at tær blivu neyðtiknar fyri eygunum á sínum næstu, og í flestu førum vóru fleiri menn um illgerðina. Vit stúra fyri, at tað eru bara tær fáu, sum koma higar, tí hinar kvinnurnar siga okkum, at fleiri orka ella tora ikki at fara á sjúkrahúsið, sigur Sam Thenya.

ST-umboðsstovan í Nairobi váttar, at kvinnur hava verið fyri grovum kynsligum ágangi undir ófriðinum.

### Óttast fólkadráp

Fólk, sum arbeiða hjá ymsum neyðhjálparfelagsskapum í Kenya, siga seg bera ótta fyri, at ófriðurin kann elva til etniskan ágang, og at tað kann enda sum fólkadráp eins og í Rwanda í nítiárunum. Danski sendiharrin í Kenya, Bo Jensen, væntar kortini ikki, at tað fer at henda.

- Tað er rætt, at etniskur spenningur er ein partur av ósemjuni um valið og ófriðinum síðani, men tey flestu í Kenya vilja fegin hava enda á ófriðinum, og at tað aftur verður friður, sigur Bo Jensen við TV2.

Sambært kenyansku myndugleikunum hevur ófriðurin síðani valið seinasta hósdag kostað 328 mannalív.

# Nú er Rahele tikin av døgum

**Hóast mótmæli varð tann 27 ára gamla Rahele Zamani hongd í einum fongsli í Iran í gjár**



*– Lat meg sleppa at vera saman við mínum børnum, bað Rahele Zamani. Men til fánýtis*

Rahele Zamani varð dømd til deyða herfyri, tí hon hevði beint fyri manni sínum. Í rættinum greiddu hon og verjin frá, hvussu illa maðurin var farin við henni, men tað ávirkaði ikki dómararnar.

Dómararnir lótu seg heldur ikki ávirka av, at Rahele Zamani átti tvey børn, eina fimm ára gamla gentu og ein trý ára gamlan drong. Í rættinum bað hon grátandi dómararnar loyva sær at vera saman við børnunum. Hon fekk 14 dagar.

Í gjár endaði hon í gálganum, og sambært mannarættindafelagsskapinum Human Rights Watch skuldu niggju onnur heingjast í Iran í gjár. Amnesty International sigur, at iranskumyndugleikarnir avrættaðu 297 fólk í fjør.

Málið um Rahele Zamani vakti ans víða. Norska stjórnin mótmælti deyðadóminum.

- Tað er ræðuligt, at tey bæði børnini skulu veksa upp faðir- og móðirleys, sigur Raymond Johansen, sum er stjóri í norska uttanríkisráðnum, við Aftenposten. Hann leggur afturat, at Noreg fer at endurtaka sítt mótmæli, nú deyðadómurin er framdur í verki.

## STUTT SAGT

### 886 tikin við markið

Danska løgreglan tók í fjør 886 útlendskar ríkisborgarar, sum ætlaðu at smíkja sær ólógliga um markið úr Týsklandi. Av teimum 886 vóru 92 børn, og tey flestu vóru úr Irak. Løgreglan sigur, at talið er næstan 20 prosent størri enn í 2006. Hinvegin ertaliðámannasmuglarum minkað úr 124 í 96. Løgreglan heldur kortini ikki, at tað er nakað tekin um, at smuglararnir eru færri í tali nú, men heldur at færri verða tiknir.

### Upptøkur skulu kannast

Amerikanski løgmálaráðharrin, Michael Mukasey, gav í gjár embætisverkinum í løgmálaráðnum boð um at kanna sjónbandaupptøkurnar, sum vísa, hvussu CIA hevur avhoyrt menn, ið hava verið undir illgruna fyri at hava samband við al-Qaeda. Blaðið New York Times skrivaði herfyri, at upptøkurnar avdúka, at agentarnir hjá CIA fóru harðliga fram undir avhoyringunum. Tað hevur CIA avsannað, men kortinihevurløgmálaráðharrin gjørt av, at upptøkurnar skulu kannast.

### Turkar banna royking

Tyrkiska tjóðartingið viðgjørdi í gjár eitt lógaruppskot um at banna royking í øllum hølum, sum eru opin fyri almenninginum. Millum hølini, sum koma undir lógina, eru matstovur og kaffistovur, og uppskotið fær stuðul frá stjórnarflokkinum, sum hevur tann neyðuga meirilutan til at samtykkja tað. Verður uppskotið samtykt, fáa matstovurnar og kaffistovurnar og hini hølini, ið koma undir lógina, seks mánaðir til at fáa sær serlig roykirúm. Kanningar hava víst, at umleið 40 prosent av øllum turkum oman fyri 15 ár roykja.